# Norskar alistøðir raktar av stormi og oljudálking

**Olja frá farmaskipinum Server, sum sakk í illveðrinum í Vesturnoregi, dálkar nú fleiri alibrúk**

ALING
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

– Vit fingu olju í alibrúkið leygardagin og góvust alt fyri eitt at fóðra, sigur Stein-Helge Skjelde hjá alifelagnum Austevoll Seafood við Bergens Tidende. Í ringunum eru umleið 200.000 smolt. Eitt annað alifelag, sum hevur umleið 250 tons av laksi í ringunum, er á somu leið, men er eftir øllum at døma sloppið undan dálkingini. Men tað var um reppið, at oljan eisini kom hagar, tí eitt bjargingarskip, sum tók olju upp av sjónum, var bara nakrar fáar hundrað metrar frá aliringunum.

Óhappið við „Server" og dálkingin hava elvt til orðaskifti um, hvussu alivinnan kann verja seg betur ímóti oljudálking, tá skip farast. Ole Braanaas, sum er formaður hjá alarunum í Vesturnoregi, sigur, at alivinnan er ógvuliga viðkvom.

- Hetta var eitt lítið óhapp og sera lítið samanborið við, hvat kundi hent, um tað var eitt fullfermt tangaskip, sum fór á land. So høvdu vit fingið eina veruliga vanlukku, sigur hann við Bergens Tidende. Hann ivast í, um tilbúgvingin er nóg góð og vísir á, at árliga taka alararnir í hesum økinum umleið 200.000 tons.

**Ikki bara oljan**

Tað var ikki bara oljan frá tí sokna skipinum, sum gjørdi skaða á alivinnuna í Vesturnoregi. Í tí nógva vindinum sakk ein alistøð í felagnum Sjøtroll í Austevoll, og umleið helmingurin av teimum 300.000 sílunum sluppu úr nótunum. Hin helmingurin er helst farin til botns við sjálvari støðini.

Ein talskvinna hjá fiskimálaráðnum sigur, at tað er óheppið, at so nógv síl eru sloppin úr ringunum, tí fara tey niðan í áirnar, kunnu tey órógva tann villa laksin. Hon leggur samstundis dent á, at tað er álagt alifeløgunum at brúka hóskandi útgerð, og at myndugleikarnir fara at kanna, um útgerðin hjá Sjøtroll var lagað til veðurviðurskiftini á staðnum.






Á Økisdeildini í Tórshavn arbeiða 15 fólk. Økið hjá deildini er Streymoy, Vágar, Nólsoy, Hestur, Skúvoy og Sandur. Starvið kann innibera ferðing.

Á Arbeiðsmarknaðardeildini starvast í løtuni 9 fólk. Deildin er landsumfatandi og starvið kann innibera ferðing.

## Almannastovan søkir sosialráðgevar til Økisdeildina í Havn og Arbeiðsmarknaðardeildina

**Á Økisdeildini í Havn, Tinghúsvegur 14, eru 3 størv leys til setan skjótast tilber:**

- Starv fyri sosialráðgeva í barnsburðarfarloyvi fulla tíð
- Farloyvisstarv fyri sosialráðgeva 3/4 tíð til 31.12.2007
- Fast starv fyri sosialráðgeva ½ tíð

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá deildini er
- at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur í sambandi við almannaspurningar
- at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni
- í serligum førum vísa áheitanum til landsumfatandi eindirnar hjá Almannastovuni

Tær sosialu fyriskipanirnar, ið deildin serliga tekur sær av eru
- ymiskar fyriskipanir sambært forsorgarlógini, herundir uppihaldshjálp og stuðul til heilivág og smærri hjálpartól
- persónliga viðbót til pensiónistar sambært pensiónslógini
- samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- tilráðingar í smb. við umsóknir um fyritíðarpensiónir

**Á Arbeiðsmarknaðardeildini, Tinghúsvegur 14, eru 3 størv leys til setan skjótast tilber:**

- Farloyvisstarv fyri sosialráðgeva í barnsburðarfarloyvi 3/4 tíð.
- Tvey føst størv vegna uppnormering.

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið er í høvuðsheitinum
- geva almenna ráðgeving og vegleiðing um stuðulstiltøk innan almannaøkið
- gera ætlanir fyri at fáa fólk út á arbeiðsmarknaðin, herundir avtalur við arbeiðsgevarar
- viðgerð av fíggjarligum veitingum
- gera tilráðingar viðvíkjandi fyritíðarpensjón
- tilráðing og uppfylging í endurbúgvingarmálum
- tilráðing og uppfylging viðvíkjandi vardum størvum, arbeiðsroyndum v.m.

Førleikakrøv fyri størvini á báðum deildum
- sosialráðgevaraútbúgving
- góður kunnleiki til EDV á brúkarastøði
- góður málburður, bæði munnliga og skrivliga
- góð samstarvsevni
- evni og vilja til at arbeiða í heildarloysnum og tvørfakligt

Lønar- og setanarviðurskifti
Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarbólki 6.

Nærri upplýsingar
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Marjun Berg, deildarleiðara, telefon 35 35 70.

Umsóknir
Sendið umsókn við avriti av prógvum, CV o.ø. til:
Almannastovuna
Smyrilsvegur 20
Postsmoga 3096
110 Tórshavn.

Umsóknarfreistin er mánadagin 22. januar 2007 kl. 12.

almannastovan
www.almannastovan.fo